# Tann knústi amerikanski

**Partur 3 av 3**

## No more gay-marriage in California !!!

*Jens Hákun G. Leo , stjórnmálafrøðilesandi á San Diego State University, California*

So varð Barack Obama endiliga valdur sum nýggjur amerikanskur forseti og einki óvæntað í tí. Obama hevði allatíðina ein fyrimun fram um John McCain undir valstríðnum. Orsøkin til, at Obama allatíðina var eitt stig frammanfyri McCain. er einføld : Bush og McCain eru báðir í tí republikanska flokkinum.

Fólk flest í USA eru troytt av George W. Bush og av republikanarum, og hetta vístu tey týsdagin, tá tey við sínum fólkaræðiliga rætti avgjørdu at ganga nýggjar leiðar politiskt sæð. Hetta innibar tað at velja eitt demokratiskt forsetavalevni fram um eitt republikanskt forsetavalevni sum nýggjan amerikanskan forseta - tann 44. í røðini. Eisini vunnu demokratarnir meirilutan í bæði Umboðsmannatinginum og í Senatinum, so alt í alt var tann 4. novembur 2008 ein dyggur smeitur fyri republikanararnar - alt hetta takkað verið einum manni - ikki McCain, men Bush !

### Obama vs Bush - Men merkir McCain tað sama sum Bush ?

USA vildi hava broyting, og millum annað av hesi orsøk valdi USA Obama og ikki McCain. Obama umboðaði nakað nýtt - broyting -, meðan McCain, um hann vildi tað ella ikki, varð sæddur sum ein nýggjur Bush. Amerikumenn vóru, og eru tað væl enn, troyttir av Bush og vildu tí helst ikki síggja ein nýggjan Bush í teimum Hvítu Húsunum, og eftisum at amerikumenn helst vildu hava broytingar at henda í amerikanska samfelagnum fram um tað at fáa ein nýggjan Bush í Hvítu Húsini, so høvdu teir einki annað val enn at velja Obama. Eg meti sjálvur ikki, at McCain hevði verið nakar nýggjur Bush, um hann varð valdur sum forseti. Tvørturímóti dámdi mær McCain hampiliga væl, men McCain hevði ongan møguleika at vinna valið, ikki tí at hann gjørdi nakað býtt undir valstríðnum, men meira tí at Bush og republikanararnir høvdu, við at hava verið so illa umtóktir millum manna seinnu árini, oyðilagt hansara møguleikar fyri at verða valdur sum nýggjur amerikanskur forseti. Eg meti, at McCain stillaði upp til skeiva tíð og til skeivt stað. Sjálvandi fór hann sum republikanskt forsetavalevni ikki at vinna á Obama, einum framúr røðara, eftir at hansara floksfelagi Bush frammanundan hevðivæl og virðiliga syrgt fyri at skatt umdømið hjá republikanarunum. McCain skuldi heldur havt stillað upp til forsetavalið í 2000 ímóti Al Gore, og hevði hann tá vunnið á Gore, so vænti eg, at hann hevði gjørt eitt væl betur arbeiði sum amerikanskur forseti, enn hvat Bush hevur gjørt. McCain stillaði eisini upp í tí republikanska flokkinum sum eitt møguligt forsetavalevni fyri republikanararnar, men republikanararnir vildu heldur hava Bush sum forsetavalevni. Kanska var tað eitt mistak, sum republikanararnir í dag mugu svíða fyri. Eg meti tó ikki, at Bush er tann ringasti forsetin í nýggjari tíð. Tann heiðurin sleppa demokratarnir Truman og Johnson at kappast um.

### Obama skal hjálpa tí vanliga amerikanaranum

Obama skal tey næstu fýra árini vera amerikanskur forseti. Hann hevur lovað broytingar, men spurningurin er so, um Obama fer at liva upp til síni lyfti. Spurningarnir, sum man kann seta sær, eru m.a., um Obama fer at megna at gera USA til eitt land, sum í ein nógv størri mun enn áður fer at taka sær av teimum veiku í samfelagnum, tí er tað nakað, sum USA tørvar júst nú, so er tað, at sitandi stjórnin tekur sær av teimum veiku í samfelagnum. Sikke´nakað sosialdemokratiskt tvætl, kann nú onkur hugsa um meg, men eg vil nú ikki siga, at tað einans er eitt sosialdemokratiskt element í tí at hjálpa teimum veiku í samfelagnum, tí hvørji eru tey veiku í amerikanska samfelagnum? Jú, tey veiku í amerikanska samfelagnum er í roynd og veru ein ógvuliga stórur partur av amerikumonnum. Eitt er tað, at tað eru nógv, sum eru heimleys í USA, men eitt annað er tað, at tað er so nógv, nógv torførari hjá tí meiniga amerikanaranum at fáa endarnar at røkka saman, enn tað er hjá tí meiniga manninum í Vesturevropa og serliga í Norðanlondum. Eg má siga, at tað hevur veruliga tikið meg av bóli, meðan eg havi verið her í Kalifornia, hvussu strævið tað er hjá nógvum at fáa endarnar at røkka saman. Amerikumenn fáa eitt nú ikki studning sum vit fyri at ganga á universiteti og noyðast at gjalda 30.000 kr um árið fyri at ganga á universiteti pluss aðrar útreiðslur. Fyri at gjalda hesar 30.000 krónirnar noyðast teir at taka lán, sum teir so koma at hanga uppá ein stóran part av teirra lívi. Aftrat hesum útreiðslum hava teir allar tær vanligu útreiðslurnar, sum vit vanliga hava í Evropa, og meira aftrat, tá tær høgu healthcare útreiðslurnar verða roknaðar uppí, og sum rosinan í pylsuendanum, so er lønin ikki serliga høg her í USA ; Onkur, sum eg kenni, verður løntur við undir 10 dollarar um tíman.



*20. januar flyta hesi bæði inn í Hvítu húsini í Washington*

### USA sendir ov nógvar pengar til Langtbortistan

USA sigst at vera eitt ógvuliga kristið land, m.a. tí at tað er so konservativt. Men eg má spyrja meg sjálvan, hvar kristindómurin hevur verið í USA hesi seinnu mongu árini. USA skal eitast at vera høgravent og skal eitast at trúgva uppá hugsjónina um at hava ein lítlan stat, og hetta er annars ein hugsan, mær dámar væl, men tó so, hóast trúnna uppá ein lítlan stat, so hevur USA ein risastóran stat. Og hvat nýtir USA so hendan risastóra statin til? At hjálpa tí meiniga manninum ? Nei, USA nýtir statin til at hava eitt óneyðuga stórt hernaðarveldi, sum bara er voksið og voksið hesa síðstu mongu áratíggjuni. USA nýtir pening til at hava hermegi í øllum møguligum londum kring heimin og nýtir eitt ótal av pengum til at tryggja seg hernaðarliga. Spurningurin er, um hesir pengar ikki vóru betri brúktir. Hvat við at betra um korini hjá tí einstaka borgaranum ? Soleiðis, sum eg skilti Jesus úr Nazaret og kristindómin sum heild, so skal man hjálpa hvørjum øðrum. Jesus gav blindum sjónina aftur, og hann grøddi lamin, og hetta eru so tvey dømi um, at Jesus gav fólki møguleikan til at liva eitt lukkuligt lív. Vit eiga at gera tað sama. Statir eiga at gera tað sama. Statir eiga at geva fólki møguleikan til at liva eitt lukkuligt lív, og er tað nakað, sum nógvir, nógvir amerikumenn ikki hava, so er tað møguleikin til at liva eitt lukkuligt lív. Teir hava ikki møguleikan til at liva tann amerikanska dreymin. Obama tosar um, at hann skal geva amerikumonnum møguleikan til eitt eydnuríkt lív. Vónandi megnar hann at geva amerikumonnum møguleikan til eitt eydnuríkt lív.

### Obama skal veita amerikumonnum møguleikan til frælsi

Eg síggi tað ikki sum sosialdemokratismu at geva fólki møguleikan til eitt eydnuríkt lív. Jú vist, kann onkur siga, at Obama ætlar sær í holt við átøk, sum kunnu roknast at vera vinstrasinnað, men eg síggi tað nettupp sum ein part av sosialliberalismuni, tá Obama vil geva fólki betri møguleikar til at liva tann amerikanska dreymin. Tað er jú ikki bara sosialdemokratisman, ið hevur patent uppá tað sosiala aspektið. Sum liberalistur trúgvi eg uppá frælsi, bæði til tjóðina og til tann einstaka frá hjálandavøldum og frá statinum sum heild, men í tí amerikanska førin-